## DAGSINS MEINING

# Orðaskifti um ítrótt

Mentamálaráðið boðar í tíðindaskrivi frá, at mentamálaráðharrin hevur fingið handað álit um ítróttapolitikk. Ítróttin hevur stóran mentanarligan og samfelagsligan týdning. Landsstýrismaðurin í mentamálum setti tí á sumri 2003 arbeiðið í gongd at orða ein almennan ítróttapolitikk. Hetta var sera skilagott og eigur táverandi landsstýrismaður sjálvsagt rós fyri hetta stigið. Umframt at lýsa, hví tað er umráðandi við virknum og miðvísum almennum ítróttapolitikki, skuldi arbeiðsbólkurin lýsa støðuna hjá ítróttinum í Føroyum í dag sum heild og greina framtíðarvisjón og menningarætlan fyri almenna ítróttapolitikkin. Landsstýrismaðurin í mentamálum hevur nú fingið handað álitið hjá arbeiðsbólkinum um almennan ítróttapolitikk.

Høvuðsniðurstøðan í álitinum er, at føroyska ítróttarørslan stendur ov spjadd, og at ÍSF sum yvirskipaður og savnandi landsfelagsskapur fyri føroyskan ítrótt undir núverandi skipan ikki megnar at virka fyri felagsítróttaligu áhugamálunum í nóg stóran mun, og harvið at standa fyri eini støðugari menningartilgongd hjá ítróttinum sum heild. Tað er tí neyðugt, at ÍSF verður styrkt umsitingarliga og fakliga. Arbeiðsbólkurin vísir í hesum sambandi á, at ÍSF í samstarvi við ymsu sersambondini eigur at skipa umstøður fyri virknari og áhaldandi føroyskari luttøku og sjónliggering í altjóða samstarvinum umframt at skipa fyri miðsavnaðari førleikamenning.

Ein liður í menningartilgongdini er, at Føroyar átaka sær at skipa fyri Oyggjaleikum aftur. Hóskandi høvi til hetta er 2015. Heldur enn eitt avmarkað mál í sær sjálvum, skulu Oyggjaleikirnir brúkast sum partur av einari miðsavnari menningtilgongd innan føroyskan ítrótt. Tað er ítróttin sjálv, vísir bólkurin á, ið hevur ábyrgdina av at seta út í kortið tey ítøkiligu langtíðarmálini fyri ítróttaliga virksemið og menningina av hesum. Um hesi mál skulu røkkast er neyðugt, at betri og tættari samstarv verður skipað millum ÍSF og sersambond tess og almennu og kommunalu myndugleikarnar. Tí er eisini neyðugt, at politisku myndugleikarnir seta orð á, hvørji mið og mál almenni stuðulin til ítrótt skal hava.

Arbeiðsbólkurin metir vera av stórum týdningi, at gongd nú verður sett á eitt veruligt og støðugt ítróttapolitiskt kjak. Hesum tykist forseti ÍSFs at vera samdur í. Annars er hann ósamdur við innihaldið. Tað ger ikki so nógv um ósemja er um innihaldið. Vit her í Føroyum eru vanliga ósamd um mestsum alt, so hví ikki um eitt ítróttaálit. Tað sum umrædur er, at vit nú fáa eitt orðaskifti um ítrótt. Vit skulu alment skifta orð um elituítrótt mótvegis áhugaítrótt, um altjóða luttøku sum eydnast á ávísum økjum og ikki á øðrum økjum, um ítrótt og fólkakheilsu, um ítrótt sum fyribyrgjandi virksemi millum ung og um ítrótt sum mentan eins væl og um ítróttamentan. Vit her á blaðnum halda álitið vera bæði áhugavert og kveikjandi og fara at venda aftur til hetta álit í blaðgreinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Good Morning, Breckmann!



**Svenning Borg**
*Vágur*

Nú hoyrist aftur um Suðuroynna, hvussu gott í her skal blíva at búgva, og tað er frá sjálvum Óla Breckmann, stavnamanninum, sum hevur verið nakar dagar í Suðuroynni og ferðast og fingið reina og fríska Suðuroyarluft niður í lunguni.

Hugur mín leitar eini seks ár aftur í tíðina, fullveldistíðina, tá komu nógvir politikkarar til Suðuroynna við einum sokallaðum Økismenningarskjali, sum bleiv lagt fram í VB-húsinum.

Fullsett hús av suðuroyingum fyri at frætta, hvussu nú Suðuroyggin skuldi koma víðari, støðuna kenna okur tíverri alt ov gott.

Økismenningarálitið bleiv latið Granskingardepulinum fyri økismenning, og var tað taktist ógvuliga smart av samgonguni, tí har bleiv tað væl parkerað, og síðani hevur ongin hoyrt nakað aftur um nakra økismenning

Okur fingu ístaðin túsund nýggj almenn arbeiðspláss í miðstaðarøkinum og onki í Suðuroynni, nú kemur so Óli, sum eisini tá var ein partur av samgonguni, aftur við einum boði uppá, hvussu okur skulu skapa okra framtíð her í Suðuroynni.

Undirrittaði hevur skrivað nógv í bløðunum um eina komandi granskingarpark og víst á tað neyðuga í at hava nøkur almenn arbeiðspláss í Suðuroynni og harvið fingið nakað av tí unga fólkinum til at støðast í oynni. Havi eisini alment bjóðað fram øki at byggja á.

Um Óli meinar nakað við tað hann sigur um Suðuroynna, so kann hann byrja við at virka fyri, at granskingarparkin verður bygd her suðuri.

Nú tveir skúlar skulu byggjast saman mitt í Suðuroynni, kundi tað verið hóskandi at bygt Granskingarparkina upp í teir skúlarnir, hvar í okur so kundi fingið ein undirvísingar- og granskingardepul av eini rímuligari stødd. Er tað eitt nú gengransking talan verður um, so er Suðuroyggin sera væl egnað.

So Óli Breckmann, tað er at bróta upp um armar og vísa í verki tín vilja at loysa málið viðvíkjandi Suðuroynni, málageipan hevur verið nokk av.

# Seriøs - motivera og virkisfús

**Hans Birgir Hansen**

Tað at broyta atburð, hugburð, málburð til at gerast meira seriøs, motiverað, og virkisfús, í øllum tí dagliga samskifti, samstarvi og í øllum kjaki skapar nýggjar lívsavbjóðingar. Tað er við atliti til at fáa skapt sær eitt sjálvstøðugt lív og gerast sjálvstøðugt vinnurekandi heimanífrá, við at kenna ábyrgd, og skyldur yvir fyri sær sjálvum, egnari familju, vinnum, kenningum o.ø. Tað leggur støði fyri alternativum lívsmøguleikum úti á bygd og í bý, í hvørjari kommunu, oyggj, skúla. Øll koma víðari í tí dagliga lívi og sleppa undan strongd og fylgisjúkum, ið merkir almenningin.

Tað at fremja slíkt yvir eitt longri tíðarskeið fer at hækka heilsustøðIð, konditión, so øll koma at kenna seg væl fyri í tí dagliga arbeiðs-,familju-,frítíðar-, privatlívi á bygd og bý í hvørjari kommunu, oyggj.Tað hevur avgerandi týdning at fáa fólk at gerast, seriøs, motiverað, og virkisfús og vísa teim á alternativar lívsmøguleikar.

# Gjeikaraskrúðgonga á Vaglinum

**Norðurlandahúsið verður alla komandi viku karmur um norðurlendska ráðstevnu um samkynd**

RÁÐSTEVNA
*Jákup Mørk*

Kanariufuglar í kolanámum. Tað er heiti á ráðstevnu, sum Felagið Bogin, skipar fyri í Norðurlandahúsinnum í komandi viku.

Endamálið við ráðstevnuni er at varpa ljós á umstøðurnar hjá samkyndum lesandi í avbyrgdum samfeløgum. Ein tilvera, sum í nógvar mátar er væl truplari, enn tá talan er um størri samfeløg enn tí føroyska.

Tað er ANSO, ið er norðurlendskur studentarfelagsskapur, sum skipar fyri ráðstevnuni, sum altso fyri fyrstu ferð skal haldast í Føroyum. Fleiri altjóða røðarar fara at hugleiða um ofta truplu støðuna, sum samkynd eru í, og tosað verður eisini um, hvussu hesir trupulleikar kunnu loysast.

Endamálið við ráðstevnuni er soleiðis at seta navn á og ítøkiligera teir trupulleikar, sum eru á økinum, eins og roynt verður at finna fram til, hvussu hesir kunnu beinast burtur.

Ráðstevnan byrjar komandi sunnudag, og heldur so fram alla vikuna. Punktum verður sett leygardagin, tá Føroya fyrsta »Pride-parada« er á skránni. Hendan verður frá Vaglinum í Havn kl. 10.00.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]


**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.